## Greenpeace-fólk tikin

Løgreglan í Keypmannahavn tók fyrrapartin 43 fólk í sambandi við vitjanina hjá amerikanska forsetanum, Brack Obama. Løgreglan sigur, at talan var um limir í Greenpeace og onnur, sum vildu gera vart við veðurlagsbroytingarnar. Eitt nú høvdu tey skelti, har tað stóð, at Obama var komin til tann rætta býin, men skeivan dag. Við hesum sipaðu tey til, at tað hevur størri týdning, at hann kemur til Keypmannahavnar á veðurlagsráðstevnuna í desember. Í dag er Obama í Keypmannahavn í einari roynd at fáa teir olympisku summarleikirnar til Chicago í 2016.




## SPD nýggjan formann

Sosialdemokratiski flokkurin í Týsklandi, sum fekk ein dyggan frammaná á valinum fyri átta døgum síðani, fær nýggjan formann í næsta mánaði. Tá fer tann 50 ára gamli Sigmar Gabriel at loysa tann 69 ára gamla Franz Müntefering av í formansstólinum hjá SPD. Hann er umhvørvismálaráðharri í stjórnini, sum nú fer frá. Á valinum seinasta vikuskiftið fingu sosialdemokratarnir 23 prosent av atkvøðunum, og úrslitið er tað ringasta hjá flokkinum síðani seinna heimsbardaga. Tað merkir samstundis, at SPD skal í andstøðu eftir at hava sitið í stjórn tey seinastu ellivu árini.

# Bygt og goldið eftir einum ári

**Bóndin á Skálanesi var tíðindafróður og greitti eitt sindur frá, tá føroyingar róðu út har. Inntøkan frá føroyingunum var so góð, at bóndahúsini vórðu bygd og goldin eftir einum ári**

EYSTURLANDIÐ
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Bóndahúsini vórðu goldin fyri inntøkurnar frá føroyingum eftir einum ári. Í seinni tíðum er matstova bygd upp í, og garðurin virkar eisini sum ferðafólkamál*

Eitt av støðunum, føroyingar róðu út frá á eysturlandinum í Íslandi, var Skálanes.

Tað var eisini eitt av málunum hjá ferðalagnum hjá Óla Jacobsen – sum tað heilt einfalt varð nevnt – og bóndin á Skálanesi greiddi eisini eitt sindur frá um ta tíðina, føroyingar vóru har.

Í dag ber ikki til at siga, at maðurin livir sum bóndi, sum hotellstjóri ella sum veiðuleiðari.

- Alt er blandað saman í dag. Ein partur av inntøkuni kemur frá at hava útlendskar lesandi búgvandi, ein onnur frá at verða ferðaleiðari hjá veiðumonnum, sum hava keypt sær lisens at veiða reinsdjór. Og ein triði partur kemur frá innheintan av æðudúni, greiðir bóndin frá.

Hann hevur eini túsund æðureiður, har hann savnar dún. Tilsamans savnar hann eini fimm kilo um árið, og tað plagdi at geva einar 150.000 krónur í inntøku. Men nú íslendska krónan er so lág, eru tær inntøkurnar falnar niður í 75.000 krónur um árið.

Hinvegin er eingin seyður longur á Skálanesi.

Hann fekk eina sótt, so alt mátti takast av. Nýggjur seyður er settur við, men hann kennir ikki leiðirnar út á Skálanes, og tískil finst eingin seyður har í dag.

### Gott lag

Ein heilt serlig uppliving við túrinum út á Skálanes var busstúrurin. Tað bar ikki til at koyra út á Skálanes við vanligum bussi, tí vegurin var snøgt sagt ikki soleiðis skikkaður, at tað lat seg gera.

Neyðugt var við serbygdum bussi við serliga høgnum hjólum. Koyrast skuldi eisini tvørtur um fleiri áir, og bakkarnir vóru í fleiri støðum so høgir, at vanligir bussar høvdu botnað og staðið fastir.

Men tað var eisini eitt upplivilsi, vóru tey flestu samd um.

Tíverri hevði hann hug at dropa, meðan ferðalagið var á Skálanesi, men tað var ikki verri enn so, at fólk hildu seg til at vera uttandura eisini.

Lagið var so gott, at nýbygdi tilbygningurin legði gólv til »Tá eg verði stórur«, sum var so lystiliga kvøðin á Skálanesi. Helst fyrstu ferð í søguni.

Og at fólki dámdi væl hendan túrin og hesar útferðirnar, sást – ella rættari, hoyrdist – týðiliga, tí gomlu slagararnir rungaðu í bussinum til tónarnar frá gittaranum, sum Atli Gregersen hevði við á ferðini.

### Peningastøð

Føroyingar róðu sum nevnt út frá Skálanesi í fleiri ár og somuleiðis út frá Brimnesi hinumegin fjørðin.

Hetta var ein góð vinna fyri føroyingar flestu árini, og ikki minni fyri íslendingar, sum tóku seg rímiliga væl betaltar fyri at leiga hús út til føroyingar, og við at keypa fiskin, sum føroyingar fiskaðu.

Bóndin á Skálanesi kundi soleiðis greiða frá, at bóndahúsini, bygd í 1921, vórðu bygd og goldin frá inntøkunum frá føroyingum eftir einum ári. Hann legði tó aftrat, at hann ivaðist í, um hetta var fullkomiliga satt.

Men eisini í aðrar mátar var nógvur peningur og ríkidømi í økinum.

Um aldarskifti fluttu nógvir íslendingar til Kanada, og tá ferðaðust teir um Brimnes, og har varð jørðin seld, og brimnesmenn seldu hana so víðari. So serliga Brimnes var ein peningamiðdepil í gomlum døgum.

Bóndin var søgufróður, og føroyingarnir væl nøgdir við túrin, hóast tað sum nevnt hevði hug at dropa nakað.

# Hetta verður endurtikið

**Á Smyril Line eru tey sera væl nøgd við túrin Í slóðum føroyinga í Íslandi, og Annika Larsen Black, søluleiðari á heimamarknaðinum, roknar við, at slíkir túrar verða fyriskipaðir í komandi árum**

ÍSLANDSTÚRUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Vit eru væl nøgd. Alt hevur gingið væl, og tann skráin, vit høvdu sett upp frá byrjan av, gjørdist størri og fjølbroyttari eftir at vit vórðu komin til Íslands, sigur Annika Larsen Black.

Hon sigur, at blíðskapurin hevur verið ógvuliga stórur.

- Og so hevur tað eisini verið ógvuliga áhugavert at hoyrt Óla Jacobsen greiða frá um viðurskiftini, sum føroyingar baldust undir í Íslandi. Vit hava fingið greitt frá ymsum hendingum, og saman um tikið eru vit ótrúliga væl nøgd, sigur Annika Larsen Black.

Tað er eisini langt frá víst, at hetta verður seinasti túrur av hesum slag.

- Eg haldi, at hetta fer at verða ein afturvendandi táttur hjá Smyril Line, at vit gera slíkar túrar. Kanska vit fara at gera soleiðis, at vit taka eina viku í Íslandi, har vit koyra longur inn í landið, og harvið uppliva eitt sindur meira, sigur Annika Larsen Black.

Og ferðalagnum hevur eisini dámt túrin væl.

- Tær afturmeldingar, vit hava fingið, eru bara positivar. Tað er einki, ið kundi havt verið annaðleiðis, og fleiri teirra siga, at tey høvdu kunnað gjørt hendan sama túrin umaftur við júst somu skrá, sigur Annika Larsen Black.



*Annika Larsen Black er sølustjóri á heimamarknaðinum hjá Smyril Line, og hon er stak væl nøgd við túrin í Íslandi*

Mynd: Jens Kristian Vang